# Føroyskt kvøld í Vega

**Seinni í hesum mánaðinum fáa føroyskir útisetar í Danmark og danir høvi at uppliva nakrar av fremstu føroysku tónleikabólkunum á palli í Keypmannahavn**

TÓNLEIKUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið 27. august verður ein áhugaverd konsert í kenda spælistaðnum Lille Vega í hjartanum av danska høvuðsstaðnum Keypmannahavn. Tá fara 200, Gestir og Makrel at hava eina mini-útgávu av Atlantic Music Event.

### Framtíðarbólkar

Á heimasíðuni hjá Vega, www.vega.dk, stendur ymiskt at lesa um tiltakið, og tað er ikki sørt, at talan er um rættuliga rósandi orð, ið føroysku bólkarnir fáa á heimasíðuni.

Um 200 stendur at lesa, at talan er fremsta føroyska punkbólkin, ið framførir politiskan rock við millum annað boðskapinum um loysing.

Í mun til hinar báðar bólkarnar, tók 200 ikki lut í Atlantic Music Event í Vega í fjør.

Prix Føroyar vinnararnir frá 2003, Gestir, verða á heimasíðuni samanbornir við íslendska Sigur Rós við sínum droymandi melodiøsa rocki.

Seinasta navnið á konsertini er sum áðurnevnt Makrel, sum í hesum døgum eru ógvuliga aktuellir í sambandi við teirra luttøku í MTV Nordics unsigned kappingini á kendu tónleikarásini. Luttøkan hjá Makrel í stóru tónleikakappingini verður eisini nevnd á heimasíðuni hjá Vega, og lagt verður afturat, at Makrel, sum tann einasti av teimum trimum føroysku bólkunum, syngur sínar sangir á enskum.



*Niels Arge Galan og 200 fara saman við Makrel og Gestir á pallin í Lille Vega í Keypmannahavn leygarkvøldið 27. august*

*savnsmynd*

### Teitur vitjar í heyst

Seinni í ár verður aftur møguleiki fyri at uppliva føroyskan tónleik framførdan av pallinum í Lille Vega í Keypmannahavn. Tað verður tann 13. oktober, tá ið Teitur fer á pallin í danska høvuðsstaðnum.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at fremsti føroyski tónleikarin stendur á palli í Vega, og heimasíðan hjá kenda spælistaðnum sparir ikki upp á rósirnar, tá ið tónlistarligu gávurnar hjá Teiti skulu lýsast.

# Einki bendur á eldáseting

**Serfrøðingar frá teknisku deild hjá donsku løgregluni eru lidnir við at gera sínar kanningar í sambandi við eldsbrunan hjá Damor sunnunáttina, og einki bendir á, at eldurin var ásettur**

ELDSBRUNI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur, sigur, at serfrøðingarnir eru farnir av landinum aftur, og nú ganga helst nakrar vikur, áðrenn nøkur endalig niðurstøða fyriliggur.




*Sambært kanningunum hjá serfrøðingunum hjá donsku løgregluni er einki, sum bendir á, at eldsbrunin á Damor sunnunáttina var ásettur*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

### Hava staðfest arnarstaðið

– Kanningarnar hjá donsku serfrøðingunum hava onga ábending givið um, at eldurin var ásettur. Sjálvur fýrstaðurin ella arnarstaðið, sum vit eisini rópa tað, er funnin, men hvør orsøkin til eldin var, er ikki staðfest enn, sigur Jón Klein Olsen.

Varapolitiinspektørurin leggur afturat, at talan kann verða um eitt skammlop av einum ella øðrum slag, men at tað ganga nakrar vikur, áðrenn nakað nýtt verður at frætta hesum viðvíkjandi.

## Íslendingar greiða frá um einskiljingar

**Síðst í hesum mánaðinum koma íslendskir politikarar og embætismenn á vitjan í Føroyum, har teir millum annað fara at greiða føroyingum frá einskiljingum í Íslandi**

RÁÐSTEVNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í sambandi við at Ísland og Føroyar síðst í hesum mánaðinum fara at skriva undir ein fríhandilssáttmála í Føroyum, verður skipað fyri einari ráðstevnu, har íslendsk embætisfólk og poltiskir ráðgevar fara at greiða frá, hvussu íslendingar løgdu til rættis einskiljingar av almennum íslendskum fyritøkum.

### Eisini mentan á skránni

Ráðstevnan verður mikudagin 31. august og hósdagin 1. septembur, og hon verður í Norðurlandahúsinum og í útvarpshøllini. Tann fyrra dagin fara íslendingar í høvuðsheitinum at greiða frá teirra uttanríkispolitikki og samstarvi við onnur lond. Somuleiðis verður tað í hesum sambandi, at greitt verður frá íslendsku einskiljingunum.

Hendan dagin er ráðstevnan í Norðurlandahúsinum, og tað verða nærmastu politisku ráðgevararnir hjá íslendska uttanríkismálaráðharran um, Davið Oddsyni, ið fara at greiða frá. Íslendski uttanríkismálaráðharrin verður sjálvur í Føroyum hesar dagarnar, tí hann skal vegna íslendsku stjórnina undirskriva fríhandilssáttmálan millum Føroyar og Ísland saman við Jóannes Eidesgaard, løgmanni.

Seinna dagin verður ráðstevnan í Útvarpshøllini, og tá fara íslendsk embætisfólk at greiða frá, hvussu arbeitt verður við at menna íslendska mentanarlívið bæði í Íslandi og uttanlands. Íslendskt mentanarlív er ógvuliga ríkt, og tað er einki dulsmál, at íslendingar veruliga hava gjørt vart við seg á altjóða pallinum við fleiri stórum nøvnum innan nógvar ymiskar listargreinar.